# Roknskaparleiðari

**Søkt verður eftir roknskaparleiðara til Skipaeftirlitið**

Uppgávurnar eru í høvuðsheitum at vera nærmasti medarbeiðarin hjá deildarstjóranum, í sambandi við fíggjarstýring og bókhald, og annars hjálpa til við øðrum uppgávum eftir tørvi.

Til starvið krevst útbúgving sum skrivstovufólk. Starvið verður lønt smb. sáttmála millum Starvsmannafelagið og Fíggjarmálaráðið í lønarflokki 4.

Hann, ið settur verður, má tola broytingar í starvinum.

Starvstaðurin í løtuni, er Skipaeftirlitið í Miðvági.

Umsóknir saman við møguligum avritum av prógvum og viðmælum skulu sendast til:

**Skipaeftirlitið**
Postmoga 26, 370 Miðvágur

Umsóknir skulu vera Skipaeftirlitinum í hendi í seinasta lagi 27. oktober 2006 klokkan 14.30.

*Meira fæst at vita um starvið við at venda sær til Skipaeftirlitið tlf 355600 og tosa við Óla Hans Hammer Olsen deildarstjóra.*

# Pedagogur/ stuðulsfólk

Søkt verður eftir 1 stuðulsfólki at arbeiða 35 tímar til Barnagarðin á Gásamýri í Leirvík frá 1. november ella skjótast gjørligt.

Arbeiðið hjá stuðlinum verður primert at menna barnið sosialt, málsligt og í ein vissan mun at strukturera gerandisdagin.

Arbeiðið verður gjørt í samstarvi við familjuna og við starvsfólkini á stovninum.

Ynskiligt er, at tann, ið settur verður, hevur hóskandi fakliga útbúgving ella royndir.

Stuðulin verður settur í barnagarðinum.

Nærri upplýsingar kunnu fáast við at venda sær til Eyðrit Gøthe á tlf. 743125.

Skrivlig umsókn við avritum av møguligum prógvum skal vera kommununi í hendi í seinasta lagi **hósdagin 26. oktober 2006.**

**Leirvíkar Kommuna**
**Postboks 42 · 520 Leirvík**
**Att.: Umsókn**

*Barnagarðurin á Gásamýru er normeraður til 32 børn. Stovnurin hevur 2 stovur. Í Rókini eru 15 børn og í Fjøruni eru eisini 15 børn. Stovnurin liggur mitt í bygdini við góðum møguleikum at nýta náttúruna. Eisini er gott bussamband norður- og suðureftir.*

**Landssjúkrahúsið**
FO 100 Tórshavn

# Sjúkrarøktar-frøðingur

## til Útistovu á Landssjúkrahúsinum

Eitt avloysarastarv, brøk 0,5, sum sjúkrarøktarfrøðingur er leyst at søkja til setan frá 1. november 2006 til og við 30. apríl 2007.

Útistova er ein starvsstova við ymiskum sergreinum undir Skurðdeplinum, sum eru: Gynækologi/ Obstretik, Almen kirurgi, Urologi og Plastisk skurðfrøði.
Aðrar funksjónir eru: forkanningar undan skurðviðgerðum, eftirviðgerðir, eftirlit, sárviðgerð, sárrøkt, smærri skurðviðgerðir, aðrar kanningar og ráðgeving.

**Førleikakrøv**
- prógv og góðkenning sum sjúkrarøktarfrøðingur
- faklig vitan innan økið
- kliniskar royndir innan kirurgiska sjúkrarøkt og viðgerð
- góð samstarvsevnir
- kann arbeiða sjálvstøðugt

Vilt tú vita meira um starvið, kanst tú ringja 304599 til Birtu Weihe, deildarleiðara í Útistovu, lokal 5400 ella til Nainu Túgvustein, virkandi leiðandi sjúkrarøktarfrøðing, lokal 5102, t-postur naina@lsh.fo

**Lønar- og setanartreytir** sambært sáttmála millum Felagið Føroyskir Sjúkrarøktarfrøðingar og Fíggjarmálaráðið.
**Umsóknarfreistin** er 30. oktobur 2006 kl. 12.00.
**Skrivlig umsókn** við CV, autorisatión, avrit av prógvum o.l., skl sendast til

**Landssjúkrahúsið**
Lønar- og starvsfólkadeildin
FO-100 Tórshavn

*Á heimasíðuni hjá Landssjúkrahúsinum www.lsh.fo sæst meira um størv við at klikkja á leinkjuna »starvsfólk«.*

# Dagrøktari

**til dagrøktina á Skála**

Runavíkar Kommuna søkir eftir dagrøktara at byrja 15.11.2006.

Viðkomandi skal hava áhuga og hegni at arbeiða við børnum.

Dagrøktarheimið skal verða soleiðis innrættað, at tað er gott og trygt at spæla innan- og uttandura.

Nærri upplýsingar viðvíkjandi starvinum fáast við at venda sær til dagrøktarleiðaran á tlf. 586004.

Skrivlig umsókn skal vera okkum í hendi seinast mikudagin 1. november 2006.




**Dagrøktin á Skála**
Bryggjan 2
480 Skála

VINNUMÁLARÁÐIÐ

## Deildarstjóri til KT-fyrisitingina í Vinnumálaráðnum

Í sambandi við at KT-fyrisitingin í Vinnumálaráðnum nú verður skipað sum deild, verður deildarstjórastarvið við hesum lýst leyst til setan eftir nærri avtalu.

**Av vanligu arbeiðsuppgávunum kunnu t.d. nevnast:**
· Ábyrgd av dagligu leiðsluni á deildini
· Veita ráðgeving til stovnar
· Ábyrgd av lógararbeiðinum á deildini
· Taka fyrisitingaravgerðir innan málsøkini
· At vera limur í leiðslubólkinum í Vinnumálaráðnum
· Aðrar fyrifallandi uppgávur

**Førleikakrøv:**
Vit vænta okkum av tær, at tú m.a. hevur:
· Útbúgving frá hægri lærustovni
· Serkunnleika til kunningartøkni
· Leiðsluroyndir innan almenna og/ella privata fyrisiting
· Góð samstarvsevnir,
· Mennandi leiðslustíl

**Vit kunnu bjóða:**
Talan er um eitt avbjóðandi og spennandi starv. Har tú sum deildarstjórin verður við til at skapa karmarnar á umsitingarligu økjunum, sum hevur stóran týdning fyri samlaðu landsfyrisitingina.

KT-fyrisitingin tekur sær av tí kunningartøkniligu samskipanini innan landsfyrisitingina sum heild. Harímillum er uppgávan hjá deildini at lýsa og gera heildarætlanir fyri KT-virksemi landsins, taka sær av málum um KT-trygd, orða og fremja KT-politikk hjá landinum o.t.

*Meiri fæst at vita um starvið við at venda sær til Arna Poulsen, tlf. 35 60 70.*

**Løn og setanartreytir**
Setanin umfatar Vinnumálaráðið og stovnar undir tí, umframt Løgmansskrivstovuna og onnur stjórnarráð. Starvið verður lønt ájavnt við 37. lønarflokk hjá Tænastumonnum Landsins, tó uttan at talan er um tænastumannastarv. Viðvíkjandi setanartreytum annars verður víst til avvarðandi sáttmála. Eftirlønin svarar til 15% av lønini.

Møguleiki er fyri, at starvsøkið verður víðkað/broytt, og má tann, sum sett/-ur verður, tola hetta.

**Umsóknir:**
Allar umsóknir verða viðgjørdar í trúnaði og skulu saman við prógvum, CV og møguligum viðmælum sendast til:

**Vinnumálaráðið**
Postrúm 377
FO-110 Tórshavn.

*Umsóknirnar skulu verða Vinnumálaráðnum í hendi í seinasta lagi 3. november 2006.*

Sosialurin -har tað hendir